Samandráttur av pallborðsfundinum 8. febr. 1987

Rusk er annað enn — rusk

— Vit eiga at brúka so nógv sum gjørligt umaftur!

— Vit mugu framleiða lutir, sum halda leingi, og sum dálka lítið, tá teir ikki kunnu nýtast longur!

— Noyðast vit at brenna burturkast, so mugu vit taka alt tað frá, sum er vandamikið at brenna!

— Vit eiga at banna innflutningi av lutum, gjørdum úr vandamiklum evnum!

Sum heild var semja um hesar setningar á pallborðsfundinum um endurnýtslu, sum FNU skipaði fyri í Norðurlandahúsinum sunnudagin 8. februar 1987. Fundurin varð hildin í samband við endurnýtslustevnuna hetta vikuskiftið. Á pallinum sótu fleiri útlendskir gestir, sum burturav arbeiða við ruskspurninginum. Hesir hildu fyrilestrar um ymisk evni í samband við endurnýtslu, og á pallborðsfundinum høvdu teir upplegg, sum var samandráttur av hesum fyrilestrum. Sama gjørdi føroyski verkfrøðingurin, Jóannes Eliassen. (Fyrilestrarnir

Við á palli vóru eisini Hanus Vang frá FNU og býráðsformaðurin í Havn, Poul Michelsen. (Uppleggið hjá ti fyrra er prentað í heftinum, hin seinni hevði einki skrivað upplegg).

Vit framleiða rusk

Samfelag okkara er so háttað, at vit framleiða ovurhonds stórar nøgdir av ruski. Bæði her heima og í grannalondunum berjast fólk við skjótt vaksandi nøgdir av burturkasti. Vit hava skilagóðar loysnir fyri neyðini. Semja var eisini um hetta á pallborðsfundinum.

Stig Hirsbak, sum arbeiðir við endurnýtslu-spurningum á norðurlendskum støði, vísti á, at tað í framtíðini ikki ber til, bara at brenna ella endurnýta seg burtur úr trupulleikunum. Einasta veruliga gongda leið er at sleppa undan ov nógvum ruski. Hetta gerst best við at framleiða lutir og tól, sum eru drúgvari í nýtslu. Hesir lutir skulu eisini gerast soleiðis, at teir ikki eru til stóran umhvørvisligan ampa, tá livitíð teirra er av.

Alt hetta tekur drúgva tíð. Tí ræður um at handfara ruskið skilagott, meðan vit taka stig til at byrgja fyri ov nógvum burturkasti.

Ruskinum í dag kunnu vit ikki sleppa okkum undan við berari brenning. Um vit bert brenna alt ruskið, skifta vit tað bara oðrvísi sundur, tók Stig Hirsbak til. Tí ræður um at brúka so nógv sum gjørligt umaftur. Og brenna vit nakað, so mugu vit skilja tað frá, sum vandamikið er at brenna.

Poul Michelsen, býráðsformaður, vísti á teir stóru trupulleikarnar, kommunurnar hava at striðast við beint nú. Henda støða er orsøkin til, at Havnar Kommuna hevur gjørt av at byggja nýggja brennistøð. Hetta er ein røtt loysn, segði býráðsformaðurin [illegible] millum annað, tí at tað ber til at nýta hitan frá støðini.

Poul Michelsen legði tó dent á, at loysnin í Havn ikki er ein »antin/ella«-loysn, men ein »bæði/og«-loysn. Hann gloppaði soleiðis dyrnar fyri at knýta brenningina at eini fráskiljingar- og endurnýtsluskipan.

Bæði/og

Fleiri av luttakarunum á pallborðsfundinum vildu ikki kolldøma brenning sum eina partvísa loysn á rusktrupulleikunum. Men øll løgdu dent á, at hetta má gerast við skili, og tað vil aftur siga, at tað skal samskipast við skiljing og endurnýtslu: Fyrst ræður um at taka frá alt tað, sum kann nýtast umaftur. Her er serliga talan um papp og pappír, glas, plast, jarn og onnur metal.

Lars Ottosen helt ikki, at hendan fráskiljing minkar munandi um nøgdirnar av ruski. Hann mælti til, at allar matleivdir eisini verða tiknar frá. Hesar leivdir eru kanska millum 20 og 30 prosent av burturkastinum, so hetta hevði munað.

Matleivdir verða summastaðni gjørdar til fóður, aðrastaðni til kompost.

Vandaleys orkukelda

Tað ber ikki til bara at brenna, tá tað sum kann brúkast umaftur, er tikið frá. Fleiri serfrøðingar vístu á vandan við brenning og mæltu til, at eisini onnur ting verða skild frá ruskinum. Her varð serliga hugsað um kemisk evni av ymsum slag, eitt nú um tað, sum er í battarium. Eitt annað evni er PVC-plast.

Hesi evni økja um vandan fyri, at tað sum kemur upp gjøgnum skorsteinin á brennistøðunum, er eitrað av nøkrum av verstu eiturevnum, vit kenna, t.d. dioxinum.

Mats Tysklind, sum granskar dioxin-spurningin, vísti á, at nøkur sløg av dioxinum eru heilt út av lagi eitrandi. Hann segði eisini, at ruskbrenning er ein hin største keldan til dioxinir.

Vit kunnu ikki endurnýta alt, stórar nøgdir noyðast vit at brenna. Hetta helt umhvørvisstjórin í Keypmannahavn, Ib Larsen. Hann segði, at vit tí ikki bert eiga at minka um nøgdirnar av burturkasti, men eisini at syrgja fyri, at tað sum verður brent, er so gott brenni sum gjørligt.

Ein brennistøð kann vera ein góð orkukelda, segði Ib Larsen. Men treytin er, at tað, sum verður brent, er bæði vandaleyst og hóskandi brenni.

Ib Larsen vísti á, at okkum í veruleikanum bert nýtist at skilja frá nøkur fá sløg av burturkasti, fyri at minka munandi um vandan við brenning.

Fyri at fáa eina góða brenning skulu vit hartil afturat taka frá tað váta ruskið. Hetta kann brúkast til fóður ella kompost. Ib Larsen helt, at ein slík skipan lættliga kann brúkast í Føroyum.

Skiljing og marknaður

Skal tað eydnast at nýta lutir, tól og evni umaftur, má ruskið skiljast. Útlendsku gestirnir søgdu, at best er, um hetta verður gjørt hjá ruskkelduni, t.v.s. í tí einstaka húsarhaldinum ella á fyritøkunum, sum lata burturkastið.

Stig Hirsbak segði frá royndum í øðrum Norðurlondum. Fleiri hættir at skilja rusk eru royndir, og tað ber í høvuðsheitum til at siga, at jú einfaldari skiljingin hevur verið, jú betri hevur úrslitið verið. Og tað einfaldasta er, at brúkarin sjálvur koyrir papp og pappír í eitt ílat, matleivdir o.t.l. í eitt annað, glas í eitt triðja o.s.fr.

Anton Elmlund frá Gendan a/s segði, at tað hevur stóran týdning, at fólk veruliga eru sinnað at skilja burturkastið — og at tey vilja skilja tað í meira enn tveir partar. Og tað vilja tey, tað vísa royndirnar, segði Anton Elmlund.

Ein onnur týdningarmikil fortreyt fyri, at grund kann vera undir endurnýtsluni, er, at tað slepst av við tey evni og tær vørur, sum skulu brúkast aftur. Marknaður má vera fyri teimum. Fleiri panelluttakarar nurtu við hendan spurningin.

Minsti ómakin at skilja frá og brúka umaftur, krevja evni sum papp og pappír, jarn og metal, glas og plast. Lars Ottosen segði, at tað er týdningarmikið, at hesi evni hava reina góðsku, um møguleiki skal vera at selja tey.

Stig Hirsbak vísti á, at tað hevur týdning, at tey skilabestu evnini og tær best hóskandi vørurnar verða gjørdar úr burturkastinum, t.d. gott fóður úr matleivdum. Hann segði, at tað er neyðugt, at vørurnar kunnu merkjast við neyvum vørulýsingum (deklaratiónum).

Hetta krevst fyri at vinna marknaðir fyri endurnýtsluvørunum. Hirsbak helt, at Norðurlond kunnu arbeiða tætt saman og økja um samhandilin við hesum vørum.

Einki hjúnasamband við EF

Føroyingar hava ein fyrimun framíhjá í mun til danskarar. Vit hava ein møguleika at sleppa undan summum sløgum av ruski, sum tey »sum eru gift við felagsmarknaðinum« ikki hava, sum Ib Larsen málbar seg.

Vit kunnu banna innflutningi av ávísum evnum.

Lars Ottosen nart við hetta málið og vísti á, at t.d. eingangsíløt úr blikki eru bannað í Føroyum. Tað sama kann gerast við onnur evni, segði Ottosen. Hann hugsaði serliga um PVC.

Ib Larsen nýtti høvi at siga frá einum góðum dømi. Í teirri keypsamsamtøkuni, sum er í grannalagnum, har Ib Larsen býr í Keypmannahavn, ber til at keypa sama slag av mati í tveimum ymsum plastíløtum, sum tykjast at vera eins. Hesi íløt eru als ikki eins. Annað teirra er gjørt úr plastevninum polyethylen, hitt úr PVC. Fyrra evnið er nærum vandaleyst, hitt seinna sera vandamikið. Ib Larsen helt, at tað er ov galið, at tað er loyvt at selja PVC-ílatið. Og hann mælti føroyingum til bert at flyta inn íløt úr evnum, sum ikki eru vandamikil.

Teir útlendsku panelluttakararnir søgdu, at teir ikki kenna so nógv til ítøkilig føroysk viðurskifti. Bæði teir, og føroyski verkfrøðingurin, Jóannis Eliassen, mæltu til kanningar av føroyskum viðurskiftum. Vit eiga at kanna mongdirnar av ruski, samansetingini av tí o.s.fr.

Samansetingin av burturkastinum er ikki púra hin sama í Føroyum sum í grannalondum okkara. Vit hava t.d. ikki so nógv kemisk evni í okkara ruski.

Takið avgerðir aftur

Tá fólkini á pallinum høvdu sagt sína hugsan um burturkastið, var opið orðaskifti. Fleiri fólk úr salinum komu fram at mikrofonini at seta spurningar ella gera viðmerkingar.

Ein teirra mælti IRF til at bíða við sini brennistøð. Hann segði, at brennistøðin í Havn er før fyri at brenna einar tvær - triggjar ferðir tað, alt fólkið í landinum tveitir burtur, og at vit, tá IRF hevur bygt sína støð, hava eina seks-dupulta orku í mun til tørvin.

Áhoyrarin vísti á, at serfrøðingar á endurnýtslustevnuni høvdu sagt, at vit eiga at skilja um eina helvt av ruskinum frá, áðrenn vit koyra í ovnin. Soleiðis fáa vit eina brenniorku, sum er 12 ferðir so stór sum tað, okkum nýtist, at sleppa av við ruskið.

Stig Hirsbak mælti til, at føroyingar koma sær upp í norðurlendska samstarvið um rusk. Hann helt at hetta fór at geva okkum eitt betri grundarlag at taka støðu á. Hirsbak lovaði at bjóða før-

Framhald á síðu 12

Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag gav nú um dagarnar út í bóklingi allar fyrilestrarnar og annað tilfar frá ráðstevnuni, sum felagsskapurin skipaði fyri fyrr í ár í Norðurlandahúsinum undir heitinum um ruskspurningin.

Vit endurprenta samandráttin av einum pallborðsfundi, sum varð hildin í samband við stevnuna.